# BØNARLØTAN

**SEPTEMBER** **2023** **38. árg.**

## *1. Fríggjadagur* *Lukas 10.1-22*




*Manningin á Juvel II*

### GRØNLAND
### Juvel II
### Gull-Britt og Karsten Hansen

Verkið í Vesturgrønlandi hevur lívgað og styrkt mong, og fleiri eru komin til trúgv. Nú fara vit til Mirjam og Niels Vang í Eysturgrønlandi. Biðið í takksemi, at Harrin varðveitir og signar vitjanina har, nú eisini veðrið kann gerast ein avbjóðing.

### KRINGVARPIÐ

3. sept. sjónvarpsmøti, Vitnið, Hvalba
3. og 10. sept. sjónvarpsandakt, Jóhan við Neyst
1. okt. útvarpsmøti, Zarepta

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukvøld kl. 21.00: Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00: Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Takk fyri tíðina heima í summar, tá eg eisini slapp til hjartalækna. Vónandi byrjar arbeiðið upp á húsini hjá mær í Porkeri 1. sept. Biðið, at alt skal ganga væl. Eg fari aftur til Senegal nú í september og skal beinleiðis á skeið í Dakar fyri bíbliuumsetarar. Eftir hetta fari eg út aftur til Tongia.



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit verða í Føroyum allan sept.

## *2. Leygardagur* — *Es. 35. 1-10*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Møtini í Kristnastovu: fríggjakv. kl. 20 og sunnud. kl. 11. Biðið fyri teimum nýggju lesandi, at tey verða varðveitt í trúnni.



**Susan og Øssur Berghamar**

Vit gleðast um, at fríggjakvøldssamkoman, sum byrjaði júst í hesum mánaði fyri 50 árum síðani, framvegis er eitt savnandi tiltak fyri ungar føroyingar, sum koma til DK at lesa. Biðið, at samkoman eisini skal vera til hjálp, menning og signing fyri tað ættarliðið, sum nú savnast í Kristnastovu.

## *3. Sunnudagur* *Lukas 10. 23-42*



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4**
Biðið fyri Malvinus í Gong, Klaksvík, og Samuel Reinert Jacobsen, Ljósá, sum byrja á bíbliuskúla á North Cotes College fyrst í september. Biðið fyri ferðini til Onglands, og at allir næmingarnir fáa eina góða byrjan.

**ZAREPTA**
Bíbliuskeið 28. aug-3. sept., kvinnustevna 8-10. sept., mansstevna 15-17. sept., hjúnastevna I 22-24. sept., hjúnastevna II 29. sept.-1. okt.

## *4. Mánadagur* *Es. 36. 1-22*

**FØROYAR**
**Danjal og Synnøve av Rana,**
**Benjamin 14, Anna Emilie 8, Lukas 3**
Biðið fyri Synnøve, sum hevur seinasta arbeiðsdag í Lívdini 31. aug. Dánjal er júst byrjaður upp á sítt seinna fýra ára skeið sum leiðari í OM Føroyum. Biðið, at Harrin leiðir og letur rættar dyr upp.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 12, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**

## *5. Týsdagur* *Lukas 11. 1-13*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Summarið hevur verið gott. Metnógv børn vóru til Vacation Bible School. Takkið fyri tey nógvu, sum eru løgd aftrat í ár. Minnist okkum, nú heystskráin byrjar í sept.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Mikudagur* *Es. 37. 1-20*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit halda á at endurskoða Matteusevangeliið til ráðgeva at kanna. Biðið fyri Sue, sum fær viðgerð fyri eina sjáldsama sjúku í eitlaskipanini. Takk fyri forbøn!

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 15, Jónatan 13,**
**Markus 11, Evita 8, Joy 6**
Summarlegurnar vóru til signing og uppbygging, og fimm ung komu til trúgv. Takk fyri forbøn!

## *7. Hósdagur* *Sálm. 101*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Skúlaárið her á NTM byrjar nú, og næmingar koma ymsastaðni

úr Evropa, eisini úr Føroyum. Biðið, at øll falla væl til. Í sept. fara vit at arbeiða saman við 3C-starvsliðnum. Tað merkir, at vit so líðandi undirvísa meir.

## *8. Fríggjadagur* *Lukas 11. 14-32*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Vit verða í Pakistan til 27. okt. Endamálið er at leggja ein grundvøll undir tænastuna komandi árini. Biðið, at Harrin verjir okkum hesar dagar, opnar dyr og at Orð hansara fær framgongd.

## *9. Leygardagur* *Es. 37. 21-38*




**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**
Vit hildu silvubrúdleyp okkara 8. aug. og takka Gudi fyri hansara trúfesti. Skúlaárið er byrjað, og fleiri nýggj koma í samkomuna, serliga barnafamiljur. Tó er stórur tørvur á hjálpandi hondum í sunnudagsskúlanum og barnaarbeiðnum. Biðið tí, at Gud kallar fólk, ið hava hjartalag fyri børnum.

*Í dag fyllir Sámuel Mikkelsen 9 ár

## *10. Sunnudagur* *Lukas 11. 33-54*

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
Ferðin til Avstralia og Nýsælands í summar eydnaðist væl. Fundirnir við leiðslurnar har vóru góðir, og vit gleðast um, at

nýggj fólk søkja Harrans leiðslu um at fara út sum trúboðarar í Evropa. Í heyst verður nógv ferðing hjá Simon.

## *11. Mánadagur* *Es. 38. 1-22*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Vit gleðast um, at ein ungur maður hevur biðið um dóp. Vit biðja, at tey ungu skulu kenna seg væl og heima í samkomuni, so tey kunnu taka onnur ung við á møti.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Biðið fyri teimum, sum hoyrdu evangeliið í Suðurgrønlandi.

## *12. Týsdagur* *Lukas 12. 1-15*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**
TeenStreet UK gekk væl. Biðið fyri tveimum gentum á liðnum, ið komu til trúgv. Missiónsarbeiðið verður nakað broytt henda mánaðin. Vit eru takksom fyri ferðina á Isle of Wight.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. Mikudagur* *Es. 39. 1-8*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Vit eru serliga takksom fyri góðu hjálpina úr Føroyum, og at fleiri grønlendingar hjálptu til á legunum í summar. Hetta er so týdn-

ingarmikið fyri børnini. Vit eru so glað um tey vinarbond, ið eru knýtt millum hesi og føroysku hjálparfólkini.

*Í dag fyllir Josva Mikkelsen 14 ár

## *14. Hósdagur* *Sálm. 102*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Vit fingu so nógva hjálp úr Føroyum, at vit kundu hava fulla barnalegu og øll, sum ynsktu at koma á ungdómsleguna. Outreach-legan í Nuuk gekk avbera væl; tí koma fleiri børn og ung nú til Naalersitaq Club hvønn mikudag. Biðið, at fleiri koma, og vit fáa onkran at týða til grønlendskt.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Heilsan hjá Daniel hevur bilað í longri tíð. Nøkur sjúkueyðkenni eru burtur, og vit hava fingið ein góðan lækna. Vit hava framvegis bíbliutímar á netinum við vinum okkara í Qasigiannguit aðruhvørja viku. Eini 3-6 luttaka hvørja ferð.

## *15. Fríggjadagur* *Lukas 12. 16-40*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan (f)**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

Noah skal hava oyrnaviðgerð og Judah skal til magakanningar. Biðið eisini, at Simon fær grøna kortið, at Karis, Judah og Ethan fáa endunýggjað visa, fyri ætlaða túrinum hjá Simon at vitja PNG

í sept. ella okt., og at dyrnar verða latnar upp fyri evangeliinum í bygdunum Meula, Malvoni, Pakia og Mile. Vónandi kunnu vit vitja Evropa og Føroyar í 2024.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*Í dag fyllir Kano Mortensen 14 ár

## *16. Leygardagur* — *Es. 40. 1-11*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Svend 15, Terji 11, Petra 9**
Mánaðarskiftið aug./sept. vitja vit í Noregi saman við norska bólkinum Rett Kurs. Evangeliskar møtirøðir í Suðuroynni eru eisini fyri framman. Gospelkonsertir verða saman við svensku hjúnunun Sarah og David Åstrøm 16. sept. í Løkshøll og 17. sept. í Salt. Eg leggi regluliga stuttan boðskap á Facebook. 30. sept. skal eg hava ein evangeliskan boðskap og syngja í Sarons Dal. Eldra dóttirin, Jenny, fer á eftirskúla í Skálavík.



**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## 17. Sunnudagur — *Lukas 12. 41-59*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**



Fyrst í okt. fara vit á legu við um 25 børnum. Biðið fyri fyrireikingunum og toyminum, at alt gongur væl og verður leitt av Harranum. Vit gleðast í vónini um familjuøking, sum Harrin unnir okkum. Takk fyri allan stuðul og forbøn í tænastuni og fyri okkum sum familju.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## 18. Mánadagur — *Es. 40. 12-31*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen (f)**
**Aron 11, Noah Kristian 9**

Vit hava funnið okkum til rættis her í Hollandi, har vit halda á í tænastuni í eitt ár. Eli, elsti sonurin, er føddur og uppvaksin í Tailandi og byrjar nú á universiteti í Hollandi. Biðið eisini fyri Aron og Noah, sum somuleiðis eru byrjaðir í skúla her – hetta eru stórar broytingar.

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 7**



*Í dag fyllir Svend í Prestgarði 15 ár

## *19. Týsdagur* *Ják. 1. 1-27*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Nógv arbeiði er enn í jarðskjálvtaøkinum. Toymir frá samkomunum hjálpa til at byggja skjól og geva fólki mat. Støðan er trupul fyri mong, príslegan hækkar, og fólk eru hugstoytt, ofta vónleys. Útivirksemið kring landið, bíbliubrævaskeið o.a. er signað, og fleiri eru komin til trúgv. Biðið, at Harrin signar landið, og at uppaftur fleiri koma til trúgv.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. Mikudagur* *2. Mós. 23. 1-16*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**

Málskeiðið í summar var gagnligt, so vit mennast málsliga og skilja nú nærum alt málið. Vit vænta okkum tvíburar. Biðið, at viðgongutíðin gongur væl.

**INDONESIA, Papua**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**

Vit eru fallin væl til, og vit læra mál og mentan. Biðið, at Gud leiðir okkum hagar, hann vil, at vit skulu arbeiða. Vit fara í farloyvi nakrar mánaðir í USA frá des. og ætla eisini at vitja í Føroyum í mars.

## *21. Hósdagur* *Sálm. 103*




**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**

Summarið var gott saman við familju og vinum í DK, har vit vitjaðu Kristnastovu og Malta. Vit fara skjótt í fulla tíð í tænastuni, bert smálutir skulu fyrst avgreiðast. Biðið, at vit seta Kristus fremst í hesi tilgongdini.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *22. Fríggjadagur* *Ják. 2. 1-26*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

Biðið fyri heilsu okkara. Eini ung hjún skuldu fara í 1-ára tænastu í Brasilia í juli, men fingu noktandi svar um visum og bíða tí nú eftir nýggjum skjølum úr Brasilia, so tey kunnu søkja um øðrvísi visum. Ungu hjúnini hava sagt íbúð og arbeiði frá sær og búgva í løtuni hjá familju.

## *23. Leygardagur* *2. Mós. 23. 17-33*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Tað gongur støðugt framá við bíbliuumsetingini. Síðst í sept. hava vit heystlegu, har vit m.a. fáa vitjan úr USA.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Cathy og eg vitja samkomur og stuðlar í USA. Tað eru seks ár síðani, vit vitjaðu tey síðst. Tað er í so leingi.

## *24. Sunnudagur* — *Ják. 3. 1-18*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3**
Lili lærir framvegis málið her; hon verður skjótt liðug á málskúlanum. Vit ráðføra okkum við leiðsluna um, hvørjum ættarbólki vit skulu arbeiða í. Nógvir møguleikar eru á oynni New Britain. Biðið um Harrans leiðslu og signing.

*Í dag fyllir Jude Poulsen 5 ár

## *25. Mánadagur* — *2. Mós. 24. 1-18*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 11, Louie 9, Rio 4**
Vit skulu skjótt taka støðu til, um vit skulu taka ábyrgdina av samkomuleiðsluni. Biðið, at vit kenna Guds vilja!

## *26. Týsdagur* — *Ják. 4. 1-17*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**
Ryan er komin væl frá skúlabyrjan. Vit eru í ferð við at skifta bókhaldsforrit. Val verður í Senegal í feb., so biðið um frið í landinum.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**



Warao-toymið er nú inni í ættarbólkinum aftur eftir mong ár. Hesa ferð longur norðuri, har einki samkomuvirksemi er. Einki jarðlendi er har, og verða húsini tí bygd á stólpar. Hálvan sept. byrjar bíbliuskúlin aftur. Vit røkja miðstøðina og skúlan, nú fólk eru heima í feriu og vitja familju og samkomur.

## *27. Mikudagur* *2. Mós. 25. 1-22*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**



Tim og Ragnhild fara til Filipsoyggjar síðst í sept. í ein mánað at vitja og styrkja systkin í Harranum. Vit bíða enn eftir, at Tim fær loyvi at steðga longur í landinum. Samkoman savnast regluliga, tey lesa í løtuni Jákupsbr. Í eini samkomu í Puerto Princesa rýmdi fyrst annar pastorurin og tók ein part av fólkinum við, og síðani fekk hin pastorurin blóðtøpp í heilan. Vit hava ikki hoyrt frá ættarbólkinum á Palawan. Nú hava vit verið tvey ár heima. Ragnhild er liðug við miðnám, Rebekka gongur á 2. ári, og Hanna gongur í 9. Biðið fyri okkum.

## *28. Hósdagur* *Sálm. 104*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Vit eru framvegis í Kanada og skriva tilfarið til Rómbrævið - stór avbjóðing! Leiðin gongur til Filipsoyggjar í heyst. Takk, at tit biðja fyri kankanaeyfólkinum. Herfyri koyrdu 6 trúgvandi um 5-6

tímar úr Nayba-samkomuni heilt til norðurendan av Kankanaey, har tey stuðlaðu trúgvandi og lærdu úr Tessalonikabr. í tveimum samkomum. Tey eru íðin at taka ábyrgd millum sítt egna fólk.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

Samkomulegan verður 29. sept.-1. okt. í Jura-fjøllunum. Biðið, at legan verður uppbyggjandi, og at øll tey nýggju í samkomuni kenna seg væl.

## *29. Fríggjadagur* *Ják. 5. 1-20*

**OM, LOGOS HOPE, DOULOS HOPE, TeenStreet**

29. juli fór Pætur Midjord umborð á Logos Hope at virka sum maskinmeistari í 3 mánaðir. 14. aug. fór Amy Hansen umborð at luttaka á STEP í 3 mánaðir. Esther Dam Hansen og Ellintur og Eyðgerð Abrahamsen eru eisini umborð. Biðið, at tey kenna Harrans nærveru.





| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**380 síður 250 kr.**

Jim Elliot og fýra av trúboðaravinum hansara vórðu myrdir av aucaindiánum í 1956. Hendingin eggjaði fleiri túsund at geva lív sítt í fulltíðartænastu. Elisabeth Elliot, kona hansara skrivaði frásøgnina um, hvat leiddi Jim til frumskógin í Ekvador. Hon brúkti dagbókina hjá manni sínum at lýsa, hví hann yvirgav alt lív sítt til Gud, væl vitandi um, at hann møguliga fekk ein óvæntaðan deyða á ungum aldri. Skuggi hins Alvalda er ein lýsing av eini merkisverdari og framúrskarandi trúarhetju.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo